Aftaná gudstænastuna fáa børnini okkurt gott omaná. Sunnudagin kl. 18 Møti við Olaf Magnussen, Toftir. Argjakórið syngur. Innsavnan til húsið. Bønarmøti hálvan tíma áðrenn møtini. Barnaansing í vikuskiftinum.

**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans,
kl. 12 Sunnudagsskúli
kl. 18 Evangeliskt møti.
Mánadag kl. 12.30 Andakt.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Einki ungdómsmøti fríggjakvøldið vegna ungdómsmøti í Oasuni hóskvøldið.
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla, Dánial á Dul Jacobsen talar, kl. 18 møti við Joseph Prince á stórskíggja.
Mánakvøldið kl. 20 felags bønarmøti við Filadelfia og Oasuna. http://www.gospel.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Hóskvøldið kl. 20 Felags Ungdómsmøti í Oasuni - einki Flare verður leygardagin.
Sunnudagin kl. 10.45 Morgungudstænasta - Alex O'Campo talar, 11.30 Barnagudstænasta.
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Fríggjadag kl. 19,30 Ársfestin hjá samkomuni.
Leygardag kl. 20 Møti.
Sunnudag møtir kl. 11 og kl.18 (bøn kl. 17,30). Vit hava vitjan alt vikuskifti av Feltsjefinum major Jan Øystein Knedal og konuni Brit, tey syngja og tala á øllum møtum, øll eru vælkomin. Sunnudag kl. 14,00 sunnudagsskúli. Suppa,sápa og frelsa síðan 1865.

**Aglow, Havn**
Leygarkvøldið 9. februar kl. 19.30 møti fyri kvinnur í Evangeliihúsinum. Tórhild Bjarkhamar talar um lívskvalitet.
http://www.aglow.fo

**Frá Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli.
Sunnudagin kl. 18 Møti v. Christian Martin Christiansen. Møti sunnukvøld verður tulkað til enskt.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM og KFUK í Havn**
Leygardagin kl. 19 í KFUK: Varðmenn hittast til veitslu.

**Tórshavnar hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Samkoman Nardus**
hevur evangeliskt møti í Vakhús í Sandavági leygarkvøldið tann 9.2. kl. 19.

**Filadelfia, Miðvágur**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.

**Missiónshúsið í Sørvági**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.
Møti kl. 18 við Egin og Maritu Henriksen.

**Vágar - Kedron í Sørvági**
Fundarøðin heldur fram í skúlanum í Miðvági fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 17. Svenning av Lofti talar. Ymiskar sangkreftir verða við.

**Saron, Flatnavegur 7, Vestmanna**
Sunnudagin Morgunmøti við breyðbróting klokkan 11. Verið vælkomin.

**Evangelisk møtir í Bygdarhúsinum í Kollafirði 8.-10. februar**
Fríggjakvøldið kl. 21.00
Leygarkvøldið kl. 20.00
Sunnukvøldið kl. 18.00
Tú ert hjartaliga vælkomin!
*Stigtakari: Getsemane, Klaksvík.*

**Frá Kollafjarðar Missiónshúsið**
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.00 og møti kl. 18.00 har tey ungu skipa fyri.
Bíbiltími verður týskvøldið kl. 20.00 og bønarløta hóskvøldið kl. 19.30.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Felagið Agape**
skipar fyri spennandi vikuskifti í Nesvík 29. februar - 2. mars. Sí lýsing í blaðnum.

**Frá Kongshavnar Kvinnufelag**
Kristine S. Hestbech heldur almennan fyrilestur um »Det gode liv« mánakvøldið 11. feb. kl. 19.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli Kl. 18 Møti við Sylverius Jacobsen og fleiri. Øll eru hjartaliga vælkomin. Týskvøldið kl. 20 Bønarløta.

**Haldórsvík**
Sang- og vitnimøti verður sunnukvøldið kl. 18 í Avhaldshúsinum. Luttøka verður úr Meinigheitshúsinum í Havn. Góðar sangkreftir luttaka.

**Missiónsvika í Missiónshúsinum Tabor á Toftum**
Sunnudagin 10. februar kl. 17 Familjumøti: Torleif Johannesen, talar. Sangur: Barnakórið úr Tabor.
Mánadagin kl. 20 Møti: Martin R. Jacobsen, talar. Sangur: Kirkjukórið.
Týsdagin kl. 20 Møti: Regin Høgnesen, talar. Sangur: Glyvra Streingjakór.
Mikudagin kl. 20 Møti: Jonna Johannesen, talar. Sangur: Tofta Streingjakór & kvartett Innsavnan til húsið.
Hósdagin kl. 20.15 Føstuguðst: Magnus B. Jørgensen í Neskirkju.
Kl. 21.30 Sang og vitnimøti í missiónshúsinum.
Fríggjadagin 15. februar kl. 17 Barnamøti: Ólavur Magnussen, talar.
Kl. 20 Møti: Sverri Kass, talar Sangur:KFUM-kórið í Klaksvík.
Leygardagin kl. 10 Bíbliutími: Thomas Dam.
Kl. 16 Barnamøti: Eyðgerð Christiansen, talar. Sangur: Barnakór av Skála.
Kl. 20 Tey ungu hava møti: Øssur Kjølbro, talar. Sangur: VOX. Innsavnan til Heimamissiónina.
Sunnudagin kl. 11 Guðstænasta við altargongd í Fríðrikskirkjuni.
Kl. 15 Sunnudagsskúli: Ann Mari Kjølbro, talar Sangur: Barnakór úr Klaksvík. Kl. 18 Møti: Hanus Simonsen, talar. Sangur: Taborkórið.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 17 Møti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Awake við Jan Jacobsen.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Hjørdis H. Petersen. Sangur við Sonlis og Tummas Símun. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Bogi Olsen talar, drekka aftaná.
Øll hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin felags sunnudagsskúli fyri Skála og Strendur í høllini á Skála kl. 14.30. Kl 19 møti.
Øll hjartaliga vælkomin
Mánakvøldið kl. 19.30 kemur sjómanskvinnuringurin saman Allar kvinnur vælkomnar.

**Aglow Eysturoy**
Møti verður í missións og Ungdómshúsinum á Glyvrum, leygarkvøldið 9. februar kl. 19.30. Byrjað verður við drekkamunni, eisini verður lovsongur. Talarar: Marna Petersen og Ása Lútsen. Allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar:)

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjadagur 8. feb. kl. 21 Ungdómsmøti. Evni: Vak og bið v/Claus Højgaard.
Sunnudagur 10. feb. kl. 17 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti luttøka av KFS v/Heina Christiansen.
Mikumorgun kl. 6 Bøn, kl. 18.30 Bíbiltími v/Boga Olsen. Evni: Kristindómur og humanisma.
Hósdagur kl. 20 Bønarløta.
Øll eru hjartaliga væl komin.

**Vælkomin til missiónsviku í Gøtu í døgunum 5.-10. februar 2008**
Møtini verða í kirkjukjallaranum.
Skrá fyri møtunum:
Fríggjakvøldið kl. 20 Knút Larsen talar. Manskórið úr Thabor í Fuglafiðri syngur
Leygarkvøldið 9. februar kl. 20 Ung skipa fyri.
Hanus Simonsen talar
Bjartur F. Johannesen syngur
Sunnudagin kl. 12 Gudstænasta v/ altargongd
Martin Restorff Jacobsen
Sunnudagsskúli verður í kirkjukjallaranum.
Kl. 18 Niels Jacob Nielsen talar. Bethaniakórið syngur. Innsavnan til nýtt missiónshús.
Fríggjakvøldið, leygarkvøldið og sunnukvøldið verður barnaansing v/bíbilsøgu, sangi & ítriv.
Drekkamuður er hvørt kvøld aftaná møti.
Hvørt kvøld er bønarløta ein hálvan tíma áðrenn møti.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnumorgun kl. 11 Breyðbróting.
Týskvøld kl. 20 Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Thabor, Fuglafjørður**
Tað verður einki ungdómsmøti ella sunnukvøldsmøti hetta vikuskifti. Víst verður ístaðin til missiónsvikuna í Gøtu. Sunnudagsskúli verður í kirkjuni sunnudagin kl. 11.

**Eydnan á Oyrarbakka**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 við Hjalgrím Davidsen, Thomas J. Askham og Valdemar Simonsen. Magda og Majbritt syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Preben Hansen.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøld 8. feb. kl. 22 - Opið hús.
Sunnudagin 10. feb. kl. 14 - Sunnudagsskúli,
kl. 18 - Møti streingjakórið syngur,
kl. 21 - ungdómsmøti v/ ungum av Strondum.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 er ungdómsmøti við Høgna á Reynatrøð.
Leygarmorgun kl. 10.00 er morgunbøn.
Sunnudagin kl. 18.00 er møti við André Matras.
Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 14 Barnamøti.
Sunnudagin kl. 11 Møti við sjónvarpsupptøku.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Missiónsvikan heldur fram.
Leygarkvøldið kl. 20 møti við Regin Høgnesen, trúboðara og Dánjal Andreasen.
Manskór úr Leirvík syngur.
Innsavnan verður til húsið.
Drekkamunnur verður aftaná.
Sunnukvøldið kl. 18 møti við Regin Høgnesen, trúboðara og Dánjal Andreasen.
Streingjakórið úr Porkeri syngur. Nátturði verður aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sang/cafemøtini halda fram Leygardagin kl. 21 sangcafe.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti/sunnudagsskúli. Kl 18 Evang sangmøti v/ Sigrid Ludvig. Luttakarar verða m.a. Sigmund, Eddie, Nimrod, Hilmar, Ben Eli, Dorthea, Streingjakórið og fleiri luttaka.
Øll eru vælkomin.

**Møtir í DK**
**Esbjerg:**
Friggakvøldið 8. feb. verður evangeliskt møti í Mølleparken, Spangsbjergsmøllevej 16 C, kl 19.30
**Sønderborg:**
Leygarkvøldið 9. feb.verður evangeliskt møti á Skolehjemmet, Søndrelandevej 28, kl 19.00.
Sunudagin kl. 10 verður breyðbróting.
**Vejle**
Sunnudagin 10. feb. kl. 16.00 verður breyðbróting og aftaná evangeliskt møti í hølinum hjá frelsens hær, Stadgårdsgade 4
Talarar og við á ferð verða Elsa og Pol Johan Djurhuus. Góður sangur og tónleikur. Aftaná øll møtini bjóða vit ein góðan drekkamun og okkur munngott aftrvið. Vælkomin at hoyra orð Harrans á móðurmálinum.

**Felagið Tórshavn, gongutúrur**
Sunnudagin 10. februar verður gingið: Kirkjubøur-Krossvatn og aftur til Havnar. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 10.00. Túrurin er heldur lættur og gingið verður umleið 3 tímar. Minst til at hava góð og heit gonguklæði og kanska matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni ella tlf. 302425.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagur 11. februar***
10.00 – 10.30 Fimleikur Grete Ellingsgaard
10.00 - 12.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Marita
14.00 – 16.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Marita
11.00 - 11.45 Enskt talumál
14.00 - 17.00 Kortspæl o.o. spøl
16.00 – 18.00 Nú verður høvi at læra kortspælið: Stýrivolt Lærari, Jógvan Bærentsen
Øll eru hjartaliga vælkomin
Møguleikin er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilmelding mánadag: 316491
***Túrur til Klakksvíkar mikudagin 20. febr... Úr Steinatúni kl.13.00. Ætlanin er at siggja Vevskúlan, áðrenn farið verður til sjónleikin: Sjóvevur***
***Aftur í Havn kl. 18.00***
***Kostnaður: 220,- Gjaldast áðrenn. Tilmelding: 316491***
***Týsdagur 12. februar***
9.00 – 12.00 Ongin teldulæra
10.00 – 11.30 Vit syngja Hanus Joensen
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Katrina Christiansen í Bringsnagøtu 6 - Jákup Lindenskov sigur frá
***Mikudagur 13. februar***
9.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Annu Grethu Harlou
12.00 Døgurði
15.00 Túrur
Vitja matvøruhandilin í Bringsnsgøtu 6 - Katrinu Christiansen
Randi/Elisabeth, fysioterapeutar
***Hósdagur 14. februar***
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin: Vit lesa: »Når englene spiller Mozart/Færø blues«, Lisbeth Nebelong. Hittast 13. mars
14.00 – 16.00 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 15. februar***
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Annu Grethu Harlou
12.00 Døgurði
13.30 – 15.00 Opið hús
Tilhaldið verður stongt kl. 15.00 fríggjadag.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at **øll** skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Gøtubrá tlf 441662.**
Opið týsdag og hósdag kl. 15-18.
***Týsdagin***
føstulávintshald.
***Hósdagin***
undirvísing av fysioterapeuti um fyribyrgjandi styrkivenjing. Øll eldri eru vælkomin.
***Bussur fer úr Syðrugøtu uml. kl. 14.45***

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
tlf. 737795.
Opið er týsdag, mikudag og hósdag, kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
Opið hvønn gerandisdag frá kl. 15-18. Um tygum mangla bil, vinarliga ring 266217.
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir.
***Mánadagur 11. februar***
Fimleikur v/ Jóhannu.
Felagssangur
***Týsdagur 12. februar***
Telduhugni v/ Jens Dalsgaard
***Mikudagur 13. februar***
Opið hús
***Hósdagur 14. februar***
Myndaveving v/ Gretu Olsen
***Fríggjadagur 5. februar***
Boccia.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.